**VIÐMERKINGAR**

# Fullveldislógin

**Bárður Nielsen**
*Løgtingslimur*



Nú kom so fullveldislógin — rokningin fyri tað vanstýring vit hava verið stýrd av seinastu skjótt 6 árini. Tað mátti enda galið við eini samgongu har annar parturin hevur eittans mál og tað er at skipa fullveldið Føroya, so hin parturin hevur fríar teymar til at gera tað, hann hevur hug til, tí fyri Tjóðveldisflokkin er politikkur, at slíta frá Danmark, hvat annars hendir í samfelagnum er fyri teir fullkomiliga líkamikið.

Vit hava nú fingið fíggjarlógina fyri 2004 á borðið, og ikki eiti á kreativiteti og sminkaðum tølum á mest sum øllum økjum. Um fíggjarlógin verður samtykt í verandi líkið, eru hópuppsagnir á veg innan tað almenna. Eitt tað grovasta dømi um kreativitet er uppgerðin av løguætlanini. Har er praksis broyttur soleiðis, at ein møgulig søla av ognini hjá Postverk Føroya á Argjum og íbúðarbygningunum hjá Landssjúkrahúsinum er mótroknað samlaðu løgunum við ávikavist 36 mió. og 30 mió. Við hesum 66 mió. kemur samlaða løgujáttanin niður á 246 mió. ið er áleið tað sama sum fyri 2003.

Samgongan hevur øll árini gjørt nógv burturúr hvussu neyðugt tað er við skattalættum, men hóast fleiri skattalættar eru givnar er samlaða skattatrekkið økt við 3% seinastu 5 árini. Í fyriliggjandi fíggjarlógaruppskot er beinleiðis talan um skattahækkingar.

Sum dømi kunnu nevnast:

- Avgjald á sodavatn 10 mió.
- Avgjald á sigarettir 10 mió.
- Avgjald á góðgæti og sjokulátu 10 mió.
- Avgjald á søtar keks, smákøkur og vaflur 2 mió.
- Avgjald á plastikk beriposar 5 mió.
- Rentustuðulin lækkar 16 mió.
- Hægri barsilsgjald 23,5 mió
- Barnaforsorgin verður flutt til kommunurnar 30 mió.

Omanfyri skatta/avgjaldshækkingar eru íalt kr. 106,5 mió. so skattalættin fyri 2004 uppá góðar 70 mió. munar ikki nógv hjá familjunum í Føroyum. So sigast má, at skattalættarnir hjá samgonguni einans eru føgur orð við ongum innihaldi, sum so mangt annað hjá samgonguni. Harumframt svíðir føroyska vinnulívi fyri nøkrum av avgjaldshækkingunum.

# Fullveldisrokningin tømir Landskassan skjótari enn væntað

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Undir viðgerðini av fíggjarlógini síðsta ár hevði undirritaði eina grein undir heitinum "dugir Samgongan at spara" tá segði undirritaði millum annað.

Tá fíggjarlógin fyri 2003 var fyri, visti Samgongan av, at um allar útreiðslir, og rætt mettar inntøkir vóru tiknar við, hevði hon víst eitt hall, hettar mátti undir ongum umstøðum henda, tí so seinkaði tað fullveldinum.

Í staðin fyri at loysa trupulleikan beinaveg, var farið yvir at skumba veruligar útreiðslir frameftir, við at fáa tær við á eykajáttanir fyri árið eftir, andstøðan saman við onkrum einstøkum samgongulimi, átalaðu hesa skeivu og vandamiklu gongd, men einki nyttaði.

Hetta var og er eftir mínum tykki ein vánaligur, vandamikil og óbúgvin máti at arbeiða uppá, nemliga at skapa eitt yvirskot, sum øll vita ikki er rætt.

Nú gongur sjón fyri søgn, tað hevur í meðal verði eykajáttanir uppá 150 mill síðani 98 men fyri 2003 verða eykajáttanir uppá 181 mill kr, tað vil siga, at vit longu í ár eru noydd at fara eftir innistandandi í Landsbankanum.

Fyri Fíggjarlógina 2003 var eg skeptiskur, tá eg sá hvussu vanlig fólk í Samgonguni slett ikki lurtaðu eftir eitt nú Landsbanka, Føroya Banka og Føroya Sparikassa, og ikki minst, segði Fíggjarmálaráðharrin at metingarnir fóru ikki at halda, tær vóru alt ov positivar.

Nú er Fíggjarlógin fyri 2004 komin og eftir at hava hugt eftir henni, er mítt sinnalag broytt, frá skepsis til undran, ella sagt á annan hátt, eg standi spyrjandi um hvussu fólk veruliga kunnu seta seg niður, og gerða eina fíggjarlóg, sum er verri mett enn tann í 2003, bæði á inntøkusíðuni og útreiðslusíðuni.

Eri ikki mest undrandi fyri tølunum sjálvum, men at Samgongan enn tosar um at livistøðið ikki skal lækkað, og at vit framhaldandi menna vælferðarsamfelagið, og at familjan hevur tað betri í 2004 enn i 2003.

Tá ein seriøsur Journalistur spurdi Fíggjarmálaráðharran hvussu tað hekk saman at Samgongan hevði brotið sítt egna Samgonguskjal, sum sigur at munurin millum inntøkir og útreiðslir skulu vaksað positivt á hvørjum ári og tað ikki sást aftur á fíggjarlógini, eftirsum hallið er uml 140 mill størri í ár enn í fjør, var svarið at Samgonguskjalið var gjørt eina heita nátt, og tá var so nógv sagt.

Tá hugsaði eg sum Nólsoyingurin segði á sinni, tá útvarpsmaðurin spurdi hvat hann segði um, at holið var rapað eystanfyri bygdina, tá svaraði gamli " hvat skal man siga , hvat skal man siga".

# Mark fyri politikki

**Danir seta avgjaldið niður 2. oktober á rúsdrekka fyri at samskipa prísleguna á rúsdrekka við hini londini í EU. Nú kostar t.d. ein fløska av vodka eini 73 krónur. Í løtuni síggja vit eisini týskar, hollendskar og belgiskar bjórframleiðarar taka seg fram á danska marknaðin við heimskendum øli, ið kann venja danir at drekka meiri góðskubjór, tí stóra fyritøkan Carlsberg er um at missa sítt óhugnaliga monopol.**

**ESSAY UM RÚSDREKKALÓGINA**

*Kim Simonsen*
*Vín- og bjóráhugaður limur í t.d. felaginum Danske Ølentusiaster.*



Neyðugt er við politikki og skilagóður politikkur er tað, sum eykennir eitt vælskipað og skynsamt land, ið virðir sínar borgarar, í mun til eitt lorta land, fult av mutri, tilvildarligum ráðandi fordómum og lógloysi. Eitt land við fólkastýri, hevur fólk, ið skulu umboða viljan, ynski og røkja tørvin hjá fjøldini. Hetta er bæði vakurleikin og samstundis avmarkingin við øllum fólkaræði sum heimspeki: fleirtalið kann áseta "sannleikan" og galdandi veruleika, eisini í eini støðu har minnilutin hevur rætt — men fólkaræði er, sum klichéin hjá Churchill sigur, tað minst ringa.

### Fólkaatkvøða neyðug

Eg vil pástanda, at um vit høvdu eina fólkaatkvøðu um at liberalisera alkoholsøluna í Føroyum og samstundis góvu loyvi at selja, framleiða og innflyta allar øl í heiminum, veikar, sterkar, grønar og gular, so vildu vit sæð eina meiriluta av Føroya fólki tikið undir við eini liberalisering. Men enn situr ein minniluti (ofta fólk ið ikki drekka sjálvi), ið enn tvíhalda um tápuligar lógir, ið eru mannminkandi og í støðum minna meg um brot á mannarættindi, t.d. at man ikki kann keypa eina líkinda útlendska bjór í landinum (og nei Carlsberg og Tuborg eru ikki líkinda bjór, men keðiligt kopi ídnaðarbjór).

### Bangnir politikarar

Politikarnir vilja einki gera við økið, tí teir halda, at ein minniluti av mótstøðufólki fer at kappa høvdið av teimum, um tey gera okkurt við rúsdrekkalógina. Men tey skulu einki gera á hesum øki, annað enn at lata fólkið í Føroyum fáa loyvi at avgera hetta mál. Av og á er neyðugt, at fólkavaldir politikarar vísa seg sum veruligir politikarar og spyrja vaksin fólk, ið annars hava loyvi at keypa alt frá fuglabyrsum til rottugift, beinleiðis hvat tey halda. T.v.s. neyðugt er at skipa fyri eini fólkaatkvøðu um serligar álvarsligar spurningar. Slíkt er ikki annað enn góð fólkaræðislig siðvenja. Í Føroyum var einaferð ein fólkaatkvøða um rúsdrekka, hon var bæði lóglig og boðaði um fólkaræði, men hetta er skjótt ein øld síðani. Tá vóru fólk, serliga menn, ið drukku ov nógv. Í dag er samfelagið fulkominliga broytt eini 8 ferð, men uttan lógin um rúsdrekkasøluna, er nærum einki broytt á hesum økinum, tí er neyðugt at spyrja seg, um tað er rætt at tvíhalda um hesa lóg.

### Samfelagið broytist og lógir skulu fylgja við

Samfelagið broytist og fólk broytast. Føroyingar eru so at sær komnir í dag, at teir eins og onnur framkomin lond vilja hava loyvi t.d. at njóta heimskendar og forkunnugar bjór og onnur vín enn tey Rúsan hevur møguleikan at keypa í Føroyum, (ið er ógvuligani avmarkað í mun til ein líkinda vínhandil t.d. í Danmark). Fólk í Føroyum í dag eru ikki bert áhugað í at "drekka seg skít", men nógv meiri at njóta okkurt forkunnugt og vilja hava loyvi at smakka tað besta heimurin hevur at bjóða av t.d. víni, bjór, Calvados, Cognac og Armanac.

Eg dugi at síggja, at einasta gongda leiðin frá einari planbúskaparligari einkarsølu er ein total liberalisering, har handlar og heilsølur fáa loyvi at innflyta øl, vín og alt slag av alkohol.

Varð ein liberalisering framd, høvdu vit sæð spennandi bjór og vínhandlar í Føroyum, eina økta kapping um prís, góðsku og útboð. Gjørligt hevði verið hjá føroyinginum at fingið hendur á tí honum lystir og øll tey tíggjutúsundavís av víni, ið Rúsan ikki hevur og tey túsundavís av sløgunum av bjóri í heiminum.

Eg haldi, at náttarlívið og ferðafólkavinnan er nógv tarnað av tápuligum lógum, ið noyða t.d. barrir at steingja á midnátt, til stóran ampa fyri ferðfólk, útisetar og føroyingar í Føroyum alt árið. Uttanfyri Havnina eru nærum eingin skeinkiloyvi givin og ikki er t.d. ein líkinda café ella barr á øllum Skálafjørðinum, meðan møtihús og samkomur vaksa í tali í hvørjari bygd.

### Misnýtarin í fokus

Heimspekin handan avmarkingina snýr seg bert um avmarking fyri at bøta um skaðilig árin av rúsdrekka millum ein milliluta av misnýtarum og roynir ikki at læra fólk at gerast skilagóðir nýtarar og at njóta t.d. veikar bjór og vín úr heiminum. Sum støðan er nú, kann ein og hvør drekka seg frá húsi og heimi við galdandi politikki, t.v.s. at avmarkingin er púra einkisigandi og er eingin avmarking, bert ein óneyðug planbúskaparlig handilsforðing, ið tarnar fríari kapping og øsir fólk.

### Forboð og avmarkingar virka øvugt

Heimspekin handan hesa avmarking er, at fólk drekka minni, um tað t.d. er dýrt og so fáar barrir og caféir hava opið (fáa skeinkiloyvi) sum gjørligt. Men allar kanningar vísa, at í londum við søgu fyri forboði og við núverandi avmarkingum drekka fólk verri og við minni skili, enn í londum við eini opnari og eldri øl og vínmentan. Í forboðstíðini í USA vuksu t.d. mafiuliðini. Í Føroyum drukku menn finspritt, meðan onnur børsaðu og spunnu gull úr neyðini. Forboð skapar bert vanlukkur og avskeplar fólk og mentan. Í mínum ættarliði á Skálafjørðinum eru nógv deyð blaðung í ferðsluni vegna rúsdrekka, ið beinleiðis kemur av einari vána rúsdrekkamentan, tí vit høvdu ongastaðni at fara (barrir, náttklubbar ella caféir), annað enn at koyra skít til Havnar. Bilurin var barrin, náttklubburin og av og á eisini diskotekið. Vit vóru skít sjálvt um eingin hevði loyvi at bestilla. Vit keyptu, stjólu rúsdrekkakort og misnýttu skipanina sum dagurin var langur. Í minum ættarliðið var rúsdrekka forboðið. Vit kundu ikki fara í nakra Rúsu, men eg rokni ikki við, at nakað ættarlið hevur drukkið so illa, so nógv og á ein ófantaligan hátt sum tey ungu á Skálafjørðinum í áttatíárunum. Tey ungu í dag hava eitt størri frælsi og duga eisini betur at drekka enn vit dugdu. Vit skolaðu blátt Vodka niður, spýðu og fullu í óvit. Tey ungu drekka nógv meiri veikar øl, vín og á ein annan máta enn vit. Forboð og ikki frælsi føra til vanlukkur.

### Rúsdrekka ella ikki? Ein pseudospurningur

Í Føroyum eru alt ov nógv, ið spilla hetta kjak við at bomba tað aftur til spurningar sum: "Hví skulu vit hava rúsdrekka?" og "Er tað neyðugt at drekka fyri at hugna sær?", ið er ein roynd at fortrongja, at rúsdrekka er ein partur av okkara mentan og hevur verið tað í 1000 ár. Síðani Gøtu Trónd hava føroyingar smakka sær á. Hetta puritanska og dupultmoralska lyndi, ið helst ikki vil viðurkenna, at rúsdrekka er til, stórtrívist millum trúgvandi og millum avhaldsfólk, men eg tími ikki at kjakast frá hesum støði. Rusdrekka er her sum kaffi og tubbak og hevur verið her á fold longur enn føroyska samfelagið.

Staturin skal stýra, og eg meini eisini, at nakað av tolli skal vera á tubbaki og alkoholi, men eg dugi ikki at síggja, um tað ger nakran mun um eg keypi eina fløsku av víni í Rúsini ella í Miklagarði. Hvat er munurin um eg keypi seks gulløl í kioskini hjá Restorff ella frá Bryggjaríinum sjálvum? Og hví hava einkarsølur, tá vit eins væl kunnu keypa vín, øl og annað í vanligum handlum? Hvat er munurin um eg keypi 6 Westmalle Dubbel bjór frá Belgia ið eru 7.0% (og tí ólógliar) ella 6 vodka fløskur frá Polen, ið eru 40% (ið eru lógligar), ella 6 vínfløskur frá Spaniu a 13% (ið eru lógligar)?

### Mark fyri politikki

Men tað er mark fyri hvat kann gerast til politik. Ein fólkaræðisstýrd tjóð ella ein statur, kann t.d. ikki áseta, hvat fólk skulu síggja í sjónvarpinum ella ikki síggja (sjálvt um Jenis roynir), hvørjum fólk hava áhuga fyri á netinum, hvat tey siga sínamillum, hvat tey hugsa, hvørjum klæðum tey ganga í (ella ikki) um tey halda føðingardag (ella ikki), jól, páskir. Vit hava trúarfrælsið og vit hava talufrælsið (undir ábyrgd í mun til Revsulógina). Onkur sigur, at alt er politikur og at siga at tað er eitt mark fyri politik er eisini ein politikkur, sjálvandi er tað ein hugmyndafrøði at avmarka politik. Fyri meg er tað so, at tá ein statur ella ein tjóð skal áseta við lóg hvat fólk drekka, um tey drekka, nær og hvar og nærum hví, tá vísir hetta, at eitt mark er brotið og politikkurin hevur blanda seg í privat viðurskifti, ið ikki raka statin ella tjóðina. Vit hava loyvi at gera av við okkum sjálvi, vit kunnu eta tað vit vilja, eisini um vit steindoyggja av tí, men ikki keypa t.d. eina Westmalle Dubbel, eina Chimay ella eina Leffe bjór (ca. 7,0%) uttan at bróta lógina.

Rúsdrekka brúkt við máta er fyri nógv ein gleði, tí ein frøði er at fara til vínsmakkingar, bjórfestivalir, í býin o.s.fr., ið er ein partur av modernaðari mentan. Tað eru føroyingar, ið hava stóran áhuga og vitan um vín og t.d. bjór, ið sjálvi hava gjørt feløg í Føroyum, ið ikki fáa teirra tørv nøktaðan, tí Rúsan situr á øllum innflutninginum, og tápuliga lógin um at bjór ikki má verða sterkari enn 5,8% oyðileggur rest.

Við núverandi lógaróskilið skjóta føroyingar seg í fótin ár eftir ár, ið ber prógv um ein bangna fjøld av politikarum. Tað er eisini sera mannminkandi, at stórar sølustevnir og nýggjar caféir skulu merkja hendan dupultmoralin í Føroyum. Í dag snýta vit okkum fyri inntøkur av t.d. rúsdrekkaframleiðslu og ein liberalisering á økinum hevði bert økt um vitan og góðskuna av útboðinum. Ein liberalisering hevði givið einstaka brúkaranum eitt úrval av t.d. fremmandum øli og skapt arbeiðspláss og eina modernisering av heldur stirvna náttarlívinum í Føroyum.

Okkum tørvar eitt nýtt kjak um hetta í Føroyum í dag. Og at politikarar og onnur, ið eru avvarðandi at hesum máli koma fram við øðrum enn fordómum og tosi um forboð, tí heimspekin handan avmarkingina er einkisigani og hjálpir tí ongum, enn ikki millilutanum av misnýtarum. Betur var, um dentur varð lagdur á at økja um útboðið av veikara ølinum og víni og lært fólk at gerast meira skilagóðir brúkarar.



*Rúsdrekka brúkt við máta er fyri nógv ein gleði, tí ein frøði er at fara til vínsmakkingar, bjórfestivalir, í býin o.s.fr., ið er ein partur av modernaðari mentan*



*Hvat er munurin um eg keypi 6 Westmalle Dubbel bjór frá Belgia ið eru 7.0% (og tí ólógliar) ella 6 vodka fløskur frá Polen, ið eru 40% (ið eru lógligar), ella 6 vínflóskur frá Spaniu a 13% (ið eru lógligar)?*




*Varð ein liberalisering framd, høvdu vit sæð spennandi bjór og vínhandlar í Føroyum, eina økta kapping um prís, góðsku og útboð*